# 07 Vestur gjørdi »ein B71«

**FÓTBÓLTUR** Aðru ferð á rað mátti ÍF lúta fyri einum av botnliðunum, tá 07 Vestur mánakvøldið vann 2-1 í Fuglafirði

Hilmar Jan Hansen

| | |
|---|---|
| ÍF | 1 |
| 07 Vestur | 2 |

Øll kenna vit tað frá rokningini, at tað ræður um at finna felagsnevnarin. Men um hugt verður at seks útvaldum dystum í Vodafonedeildini, sum eru úr trimum teimum síðstu umførunum og fevna um somu fýra liðini, kann tað vera eitt sindur torført: ÍF-B71 1-2, NSÍ-07 Vestur 9-0, NSÍ-ÍF 1-1, 07 Vestur-B71 2-0, B71-NSÍ 1-6 og ÍF-07 Vestur 1-2.

Nei, felagsnevnarin er kanska ikki lættur at finna, men mynstrið fornoktar seg ikki, tí ÍF sær út til at standa seg væl ímóti betru liðunum, men ikki ímóti teimum lægru. Stigatalvan lýgur ikki, tí hon fortelur okkum, at 07 Vestur og B71 eru tey niðastu liðini – enntá við syndarligari málúrtøku. Men kortini megnar ÍF bara at skora eitt mál ímóti hvørjum av botnliðunum og tapa fyri teimum.

Ei undir í, at ÍF-venjarin, Abraham Løkin, eftir dystin mánakvøldið staðfesti, at fuglfirðingar nú mugu hyggja niðureftir, heldur enn uppeftir:

– Vit skulu gloyma alt um at hyggja uppeftir, men royna at fáa tey stigini, vit kunnu, og so royna at vinna tey bestu liðini. Í næsta triðingi av kappingini mugu vit so taka tey niðaru liðini eisini, segði hann.

## Ikki nokk at javna

Dysturin í Fuglafirði var linligur tað mesta av fyrra hálvleiki, og tað sást, at 07 Vestur var komið til Fuglafjarðar eftir einum stigi. Tað útgangsstøðið bøttist kortini munandi stutt fyri hálvleik, tá Badara Diedhiou mitt fyri sendi bóltin út í vinstru til Clayton Soares, sum kom inn í ÍF-brotsteigin og trygt kundi leggja gestirnar á odda 1-0.

Hetta legði enn meira trýst á ÍF, sum eisini royndi í seinna hálvleiki. 07 Vestur hevði tó tamarhald á tí mesta, sjálvt um bæði Bogi Løkin og Nenad Saric við skotroyndum raktu ávikavist yvirliggjara og stong. Fuglfirðingar sóu alsamt meira uppgevandi út á vøllinum, men trígjar minuttir fyri tíð brast fyri nev hjá Saric, tá hann úr 15 metrum smekkaði bóltin í málið til 1-1.

Nú stóð á jøvnum, men minuttin eftir gjørdist tað í staðin 07 Vestur, sum fór við øllum. Jovan Radinovic-Panic spældi í einum mótálopi Eli Falkvard Nielsen púra leysan, og hóast tveir ÍF-arar vóru skjótir á honum, fekk hann mestsum skrúvað bóltin í málið, so 07 Vestur vann 2-1.

– Í dag var tað stong inn hjá okkum, men vit hava gott fólk og trúgva á, at vit kunnu vinna á øllum. Vit kunnu saktans klára okkum og halda okkum uppi og enntá fara á Summarfestivalin, staðfesti Tór-Ingar Akselsen, sum sipaði til, at ÍF og 07 Vestur eisini skulu spæla tvær hálvfinalur í steypakappingini – ta fyrru í Fuglafirði longu í annaðkvøld...

*hilmarjan@sosialurin.fo*

### **ÍF - 07 Vestur** 1-2 (0-1)

Dómari: Rói Jacobsen

**0-1: Clayton Soares, 43.**
**1-1: Nenad Saric, 87.**
**1-2: Eli F. Nielsen, 88.**

**ÍF:** Hallgrím Gregersen – Áki Petersen, Bartal Eliasen, Høgni Zachariasen, Jan Ó. Ellingsgaard – Dánjal á Lakjuni, Fritleif í Lambanum, Aleksander Jovevic (Karl A. Løkin, 54.), Ari Ó. Ellingsgaard (Bárður á Lakjuni, 69.) – Chris Moumaife (Nenad Saric, 54.), Bogi A. Løkin
Gult kort: Bogi A. Løkin, Ari Ó. Ellingsgaard
**07 Vestur:** Kristian Joensen – Sjúrður Ellefsen (Holgar Djurhuus, 56.), Téhé Aristide, Jón Nielsen, Rógvi Nielsen – Jens Erik Rasmussen (Henning S. Joensen, 69.), Jovan Radinovic-Panic, Badara Diedhiou, Eli F. Nielsen, Tór-Ingar Akselsen – Clayton Soares (Sigtór A. Petersen, 90.)
Gult kort: Rógvi E. Nielsen, Sjúrður Ellefsen, Téhé Aristide, Tór-Ingar Akselsen







*Argjamenn gjørdu sær í gjárkvøldið dælt av, at suðuroyarliðini spældu javnt, so AB nú er næstfremst, tvey stig aftan fyri FC Suðuroy og eitt stig framman fyri TB. Nicolaj Eriksen (vinstrumegin) skjeyt aftur hesa ferð tvey mál fyri AB*

*Mynd: Terji S. Johansen*

# Argjamenn eru aftur við

**FÓTBÓLTUR** Samstundis sum suðuroyarliðini, FC Suðuroy og TB, spældu javnt, syrgdi AB við sigri á NSÍ í gjárkvøldið fyri at sleppa upp í part aftur heilt har frammi

Hilmar Jan Hansen

Enn eru bara sjey umfør farin av landskappingini í 1. deild hjá monnum, men kortini styrkist ábendingin um, at tað fyrst og fremst verða suðuroyarliðini og argjamenn, ið skulu kappast um uppflyting, samstundis sum tað kundi sæð út til, at skálamenn liggja og lúra nakað aftanfyri.

Í gjárkvøldið var fult umfar í næstbestu mansdeildini, og har vóru tað fyrst og fremst teir í AB, ið fingu nakað burturúr, tí við heimasigri á NSÍ fekk AB hálað seg upp á næstfremsta plássið, tí TB og FC Suðuroy spældu javnt sínamillum. Sostatt er AB nú á uppflytingarplássi saman við FC Suðuroy.

Hinvegin er nokk eitt sindur meira ógreitt, hvussu kappingin í botninum á stigatalvuni fer at síggja út, tí har tykist bert greitt, at tað verður meira enn bara torført hjá teimum næstbestu í 07 Vestur at klára seg. Spurningurin er so, um okkurt annað felag eisini skal missa sítt næstbesta manslið niður í triðbestu deildina, ella um okkurt av lægru fyrstuliðunum kemur í trupulleikar.

## Jøvn toppuppgerð

Stóri toppdysturin var spældur í Hvalba, har TB tók ímóti FC Suðuroy, og Suðuroyarportalurin vil vera við, at har mundu vera eini 400 fólk og hyggja. Dysturin var kanska ikki so væl spældur, men tó spennandi, so teir mongu áskoðararnir fingu eina oyggjaruppgerð, ið hevði tað, sum skuldi til – harímillum ikki færri enn sjey gul kort!

Tvær ferðir var TB á odda í dystinum, men kortini megnaði FC Suðuroy báðar ferðir at koma afturíaftur. FC Suðuroy brendi eitt brotsspark mitt í fyrra hálvleiki, tá tað var 1-0 til TB, men fekk hinvegin seks minuttir fyri tíð javnað til endaliga úrslitið, 2-2, við júst einum brotssparki.

Úrslitið í Hvalba merkir, at FC Suðuroy er trý stig framman fyri TB, men júst javnleikurin gjørdi, at AB við sigri í sínum dysti kundi halda seg framat og er nú millum suðuroyarliðini á stigatalvuni, tvey stig aftan fyri FC Suðuroy.

Tað vísir seg nú eisini, at AB, sum flutti niður úr Vodafonedeildini síðsta kappingarár, er við at finna stevið og formin, so kósin meira og meira miðvíst verður sett beint uppeftur. Leygardagin vunnu argjamenn heima 5-2 á EB/Streymi og í gjárkvøldið, tá NSÍ vitjaði á Argjum, gjørdist tað til 4-0, so her var eingin slingur í hjá heimaliðnum. Teir næstfremstu hjá NSÍ hava argað fleiri av hinum liðunum og er framvegis triðfremst.

## Skála komið í gongd

Eitt annað av liðunum, sum hevði eina sera trilvandi byrjan, men nú sær út til at vera komið rættiliga í gongd, er Skála, sum í gjárkvøldið spældi á útivølli ímóti FC Hoyvík. Á pappírinum skuldi hetta verið ein rættiliga krevjandi dystur hjá skálamonnum, sum á stigatalvuni lógu undir liðini á hoyvíkingum, men Skála gjørdi bart og vann 4-1.

Hetta var triði stórsigurin upp í slag hjá Skála, sum av álvara sær út til at vera á veg frameftir. Enn er ikki so langt útliðið, at spennandi verður at síggja, ið um skálamenn makta meira enn hetta og kanska kunnu bjóða onkrum av teimum av, sum liggja enn longur frammi. Hoyvíkingar síggja ikki út til at skula gera tað, og ósigurin í gjárkvøldið merkir, at FC Hoyvík nú er dottið niður millum botnliðini.

Dysturin í Gøtu í gjárkvøldið var millum tey bæði niðastu liðini, Víking og 07 Vestur, men her var ongantíð nakar ivi um úrslitið, tí Víkingur vann ein sannførandi 5-2 sigur, ið kundi verið uppaftur størri, tí í síðsta minutti bjargaði málverjin hjá 07 Vestur brotsspark frá Víkingi. Víkingur er framvegis næstaftast, meðan 07 Vestur sær uppaftur meira innibyrgt út á aftasta plássi, har vágamenn enn eiga fyrsta stigið til góðar.

Triði dysturin var við Margáir, har EB/Streymur vann 2-0 á HB. Teir næstbestu hjá EB/Streymi liggja sostatt framvegis væl fyri miðskeiðis á stigatalvuni, meðan HB nú er farið at teljast millum botnliðini.

*hilmarjan@sosialurin.fo*